Dartkapping

Seinasta vikuskifti skipaði dartfelagið Strálan fyri kapping í einmans- og tvímansleii.

JÁKUP MØRK

Vikuskiftið 22. og 23. januar skipaði Strálan fyri dartkapping.

Leygardagin varð kappast í einmansleiki, og gjørdist úrslitið her, at Poul Poulsen úr Havnar Dartfelag vann finaludystin móti Henningi Thomsen úr Argja Dartfelag.

Triðja plássið í kappingin fór til Kjell Johansen úr Stráluni og Henrik Pedersen úr Havnar Dartfelag.

Aftur Poul

Sunnudagin varð so dystast í tvímansleiki, og eisini her eydnaðist tað hjá Poul Poulsen at fáa gullmerkið. Saman við Henrik Pedersen eydnaðis tað at vinna á Alvin Egholm og Suna Rasmussen úr Havnar Róðrarfelag.

Á triðja plássinum í tvímansleiki vóru Elias Mikkelsen/Regin Enghamar úr Havnar Róðrarfelag saman við Petur Grønagarð/Henning Thomsen úr Argja Dartfelag

4 tey fremstu pørini síggjast her við steypum sínum. Sum sæst, hevur Poul fingið størsta fongin

John setti met

15 mál er størsta tal, sum nakar leikari hevur megnað í einum dysti hetta kappingarárið.

JÁKUP MØRK

Í dystinum í høllini í Vestmanna sunnudagin skeyt John Petersen heili 15 mál, og hetta hevur eingin annar leikari megnað í ár.

John hevur eisini skotið 14 mál í einum dysti, tá teir í grundspælinum vitjaðu Neistan. Tveir aðrir leikarar í fyrstu deild hjá monnum hava eisini megnað at skotið 14 mál í einum dysti, og eru hesir Artur Johansen, sum skeyt 14 mál á útivølli móti H71, og Heini Joensen, sum bæði móti Tjaldur og H71 hevur rokkið sama tali.

Hjá kvinnunum heur Ioana Rápa eisini megnað at skotið 14 mál tvær ferðir, norðuri í Klaksvík og á heimavølli móti VB. VB málverjin mátti somuleiðis finna seg í, at Vesna Tomajek fekk 14 mál, tá vágsgenturnar vitjaðu norðuri í Klaksvík í grundspælinum.

Ayr fekk javnleik

Ayr United megnaði á útivølli at fáa javnleik móti liði úr besti deildini. Føroyski landsliðsskiparin sat á beinkinum allar 90 minuttirnar

JÁKUP MØRK

Jens Kristian Hansen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá skotska felag hansara, Ayr United, í steypakappingini megnaði at fáa javnleik 0-0 á útivølli móti Premier League liðnum, Dundee.

Hóast javnleikurin var heldur óvæntaður, so var tað í øllum førum ikki óuppiborið, at Ayr nú fær enn ein møguleika í kappingini, tá umdystur verður á heimavølli.

Liðfelagarnir hjá Jens Kristiani høvdu nevnliga fleiri ferðir høvið at avgera dystin, men inn vildi bólturin ikki.

Móti endanum hevði Dundee tó onkran møguleika at skora sigursmálið, men í seinastu løtu eydnaðist tað verjuleikara hjá at verja fyri, tá álopsmaðurin hjá Premier league felagnum hevði beina kós móti málinum.

Næsti dysturin hjá Ayr verður á heimavølli, tá teir skulu royna seg móti Greenock Morton, sum liggur á áttanda plássi í skotsku fyrstu deild. Ayr liggur í løtuni á sjeynda plássi

Máltindurin

1. deild kvinnur

Ioana Rápa	VÍF	118	(38)
Regina Rádó	VB	106	(31)
Lotte Sørensen	Kyndil	86	(36)
Vesna Tomajek	Stjørnan	81	(33)
Sunrid Gleðisheygg	Tjaldur	77	(19)
Inga F. Danberg	Neistin	76	(21)
Jacklin Durhuus	VÍF	74	(5)
Arnleyð Krosslá	VB	58	
Gurið Mortensen	VB	55	
Ann Hansen	Kyndil	50	(10)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	49	(2)
Mona Langgard	Tjaldur	49	(7)
Nicolina Joensen	VÍF	49	
Ileana Manolescu	Neistin	48	(13)
Katrin á Neystabø	Neistin	48	(13)



Tær báðar ovastu kvinnurnar í máltindinumj eru í løtuni Ioana Ráða og Regina Rádó

1. deild menn

Sámal Joensen	VÍF	140	(29)
Heini Joensen	Neistin	126	(27)
John Petersen	StÍF	122	(37)
Artur Johansen	StÍF	116	(23)
Áki Olsen	Neistin	110	(14)
Bjarni Wardum	Kyndil	89	(24)
Ingi Olsen	VÍF	85	(6)
Jakob Jónsson	Kyndil	83	(4)
Petur Martin Johansen	KÍF	79	(23)
Halgir D. Olesen	H71	77	(5)
Sverri Justinussen	Tjaldur	76	(9)
Suni F. Johannesen	Tjaldur	69	(20)
Martin Hummeland	VÍF	61	
Tummas Magnussen	Tjaldur	57	(2)
Jákup Dam	KÍF	57	(5)

Støðan 1. deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Stjørnan	2	2	-	0	-	0	344	266	78	13
2	VÍF	4	2	-	0	-	2	356	319	37	11
3	Neistin	3	3	-	0	-	0	278	266	12	11
4	Kyndil	2	1	-	0	-	1	290	249	41	9
5	VB	3	1	-	0	-	2	324	333	-9	6
6	Tjaldur	4	0	-	0	-	4	247	406	-159	0

Stíf hevur tikið liðið úr kappingini

Støðan 1. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	5	4	-	0	-	1	497	393	104	19
2	StÍF	4	3	-	0	-	1	467	405	62	17
3	Neistin	3	3	-	0	-	0	448	381	67	15
4	Kyndil	4	2	-	0	-	2	448	395	53	11
5	H71	5	1	-	0	-	4	406	482	-76	4
6	Tjaldur	4	0	-	0	-	4	395	495	-100	3
7	KÍF	3	1	-	0	-	2	326	436	-110	3

Í rasshaft av risabili

Íslendingur, i› eigur Føroya hægsta persónbil, hevur l‡st akfar sítt til sølu. Orsøkirnar eru bæ›i privatar og almennar

Ein manshædd er upp undir gluggarnar á risa-jeepinum í Klaksvík.

HØGNI MOHR

Arnfinnur Gu›jonsson í Klaksvík hevur eittans val. Antin selur hann sín risa-bil, ella koyrir hann einsamallur, me›an konan fer til gongu. Ert ert tú av álvara skotin í tíni hjartans kæru, ja, so er ikki anna› fyri enn at eftirlíka, og selja tín høgt elska›a bil.

Orsøkin til hetta lagnukenda val, er einføld. Bilurin er somiki› høgur, at bæ›i kona og vermó›ur hava stórar trupulleikar tá i› tær skulu sleppa sær upp um gáttina og inn í hetta ógvusliga akfar.

Nítjan ára gamli Toyota-jeepurin, i› tykist sera vælhildin, var› fluttur inn í landi› úr Íslandi fyri kortum. Umframt at dragast vi› skemtiligu hæddarræ›sluna á heimavølli, sigur Arnfinnur seg hava trupulleikar vi› tollvaldinum. Hann og tollvald trætast um, hvussu bilurin skal vir›ismetast í sambandi vi› tolling. Tollvaldi› sigur, at bilurin skal vir›ismetast eftir n‡vir›i, men ta› heldur íslendingurin vera at taka heldur rívan til. Talan er sum kunnugt um ein rættiliga gamlan bil.

Hetta er helst størsta orsøk til, at sjáldsami jeepurin er til sølu. Hitt vi› konuni og vermó›urini er helst mest til skemtanar.

Pungar á floti

Klaksvíkar Sjómansskúli hev›i í farnu viku frálæru í stjóring á keiøkinum úti á Nor›borg

HØGNI MOHR

Sjómansskapur er anna› enn navigatión og fiskiskapur. Av beiskum royndum, vita føroyingar, at skip og bátar kunnu farast bæ›i brátt og skjótt. Um so illa vil til, kann gerast ney›ugt at sleppa fótafestinum á tí á›ur so trygga bátadekkinum og loypa á blámann.

Hetta liggur so fast í føroyska sjómanninum, at ta› er sjálvsagdur partur av útbúgvingini á sjómansskúlunum. Eisini í Klaksvík, har pungarnir á grundarútbúgving skúlans royndu seg í yvirlivilsisbúna t‡sdagin.

Ingvard Thorsteinsson kom yvir um í øllum gó›um, tá i› Klaksvíkar Sjómansskúli var úti á Nor›borg og lærdi næmingarnar at stjóra. Vágbingurin tekur grundarútbúgving í sjómansskapi í Klaksvík.

Lop og krúp

Teir eru sjey næmingar í flokkinum, sum standa úti á Nor›borg hendan fagra seinnapartin. Lærugreinin er trygd, og lærarin er sjálvur stjórin á Klaksvíkar Sjómansskúla, Poli Mikkelsen. Teir hava spent enda millum innastu molarnar, og allir sjey skulu royna at ver›a stjóra›ir teir umlei› 60 metrarnar millum molarnar.

Poli Mikkelsen hevur gott tak á ídnu pungunum. Bjargingarroyndirnar ganga upp á stás, og allir unglingarnir fara óbidnir á blámann og koma læ›andi upp aftur á turt. Tá vit spyrja, um allir næmingarnir tora eins væl, skeitir Poli upp á okkum og sigur argandi:

- Summir loypa, a›rir krúpa...

Handverkaraeftirútbúgving

Skeið

fyri húsavør›ar
í vi›líkahaldi av bygningum
17. - 18. februar 2000

Undirvíst verður í:
Ljósanleggi, lásaskipanum, oljuf‡ri, ventilatiónsverki, reinger›, reinger›arambo› og vi›líkahaldsplanur...

Skeiðleiðarar:
Tummas Lauritsen, TST.

Skeiðkostnaður:
kr. 1.000,- (skal gjaldast vi› tilmelding)

Tilmelding:
á›renn **9. februar 2000**

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.

Frábo›an um luttøku og nærri frágrei›ing (eisini um innivist v.m.), fæst vi› at venda sær til skúlan á tlf. 311957, (mánadag – fríggjadag, kl. 8 –12 & 13–16)

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 - P.O.B. 239
FR-110 Tórshavn

ÚTSØLA

Hjá Torgerð Suðuroy

Gull · Silvur
(eisini til før. búnan)
Gávulutir · Antik
Møblar o.a.

ALT FYRI 1/2 PRÍS

Sp/f Alvi
Árvegur 14
Tlf. 319546

Lýsið í sosialinum